Fróðskaparsetur Føroya

## Lestrartilboð á Náttúruvísindadeildini

Í summar verður upptøka av lesandi til Náttúruvísindadeildina.

Skipanin er soleiðis, at ein fyrst tekur eina 2 ára náttúruvísindaliga støðisútbúgving, sum er grundarlag fyri framhaldslestri bæði á Náttúruvísindadeildini og á útlendskum universitetum.

**Støðisútbúgvingin**
Í summar verður tikið upp til 2 ára stødd-/alisfrøðiligu støðisútbúgvingina, sum er grundarlag undir BS-útbúgvingum á Náttúruvísindadeildini og framhaldsútbúgvingum í útlondum.

Fakliga støðið í støðisútbúgvingini er sum fyri 2 ára byrjanarlestur á útlendskum universitetum. Undirvíst verður í evnum innan stødd-, alis-, teldu- og tøknifrøði.

Upptøkutreyt er støddfrøðiligt studentsprógv við støddfrøði á A-stigi, alisfrøði á B-stigi og evnafrøði á C-stigi. Fólk við øðrum fortreytum við tilsvarandi kunnleikastigi í nevndu lærugreinum kunnu verða tikin upp eftir meting.

**BS-útbúgvingar**
Hetta eru 1-1 1/2 ára útbúgvingar oman á støðisútbúgvingina: í jarðalisfrøði (1 ár), kolvetnisverkfrøði (1 1/2 ár), ravmagnsverkfrøði (1 1/2 ár) og teldufrøði (1 ár). Útbúgvingin í kolvetnisverkfrøði er nýtt útbúgvingartilboð, og fer fram í samstarvi við m.a. Høgskolen í Stavanger.

Ein er ikki fastlæstur í sínum vali av BS-útbúgving frá fyrsta lestrardegi, tí støðisútbúgvingin er í stóran mun felags uttan mun til val av BS-útbúgving. BS-útbúgvingarnar enda við eini seruppgávu, ið m.a. kunnu verða gjørdar í samstarvi við vinnulívið.

Upptøkutreyt er lokin stødd-/alisfrøðilig støðisútbúgving. Aðrar fortreytir við tilsvarandi kunnleikastigi kunnu verða góðkendar eftir meting.

**Aðrir møguleikar**
Bæði aftan á støðisútbúgving og aftan á BS-útbúgving ber til at fara uttanlands at útbúgva seg til hægri førleikastig, eitt nú sivilverkfrøði og cand.scient. ella MSc.

**Meir at vita**
Meir fæst at vita við at venda sær til Náttúruvísindadeildina ella við at kaga í heimasíðuna á http://www.setur.fo/setur/nvd/

**Umsóknarbløð og -freist**
Umsóknarbløð fáast við at venda sær til Náttúruvísindadeildina, Nóatún, FO 100 Tórshavn. Tlf. 315306, fax 316844, teldupostur: RandiD@nvd.fo

Umsóknarfreistin er 30. juni 2000.

*Lýsið í* **sosialinum**

## Lærarar til Føroya Læraraskúla

Føroya Læraraskúli, sum hevur læraraútbúgving og pedagogútbúgving, søkir eftir lærarum komandi skúlaárið í hesum lærugreinum:

| | |
|---|---|
| enskum | ( 6 tímar) |
| týskum | ( 6 tímar) |
| landalæru | ( 6 tímar) |
| søgu | ( 6 tímar) |
| donskum | (10 tímar) |
| lívfrøði/náttúru | ( 9 tímar) |
| smíð | (15 tímar) |
| samtíðarkunning | ( 3 tímar) |
| skriving | (1 1/2 tími) |
| ítrótt (kvinna) | ( 7 tímar) |
| føroyskum | ( 5 tímar) |
| drama | ( 2 tímar) |
| námsfrøði/serlestri | (10 tímar) |
| samfelagsfrøði | ( 4 tímar) |
| kristni (einans heysthálvuna) | (11 tímar) |

Vikutímatalið er viðmerkt aftanfyri hvørja lærugrein. Møguleiki kann vera fyri fastari setan.

Størvini verða sett frá 1. august 2000.

Umsøkjarar skulu skjalprógva neyðugan undirvísingarførleika. Innlit og royndir í undirvísing á lærara- og pedagogútbúgving eru ein fyrimunur.

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Magistarafelag Føroya og Føroya Landsstýri.

Áhugað, sum vilja hava meira at vita, kunnu seta seg í samband við Paula Nielsen, rektara, tlf. 313501, teldupostsamband paulini@flsk.fo

Umsóknirnar skulu stílast til Føroya Læraraskúla, Postrúm 348, FO-100 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er úti 18. mai 2000.

**Tórshavn 27. apríl 2000**

## Útróðrarbátur til sølu

M/B Havfari 32 ton og egningarskúrur á Stongunum við 120 svøvla línum og 10 aut. snellum, fiskiloyvi í bólki 4a, 30 dagar á Føroya Banka, snelluloyvi í Íslandi, til sølu fyri 950.000 kr.

**Tlf. 457735**

## Frá Føroya Arbeiðarafelag

Sagt skal verða frá, at frá 1. mai hækkar tímalønin frá kr. 80,17 upp í kr. 83,72.

Somuleiðis verður heitt á allar limir, ið hava fingið limakort, at boða teirra arbeiðsgevara frá hvat limanr. er.

## Leikrita-kapping

**Innbjóðing**
Leikpallur Føroya lýsir við hesum til kapping um leikrit til nýggjan føroyskan sjónleik.

**Endamál**
Okkara tíð nú um stóra aldaskiftið er full av avbjóðingum og nýggjum møguleikum. Saknur er á føroyskum leikum, ið lýsa hesa fjølbroyttu og skiftandi tíðina, ella sum úr søgu og fortíð taka upp evni, ið hava týdning fyri okkum enn í dag. Endamálið við kappingini er at menna sjónleikin í Føroyum og fáa fram nýskrivað leikrit, hugtakandi, hugvekjandi og hóskandi til nútímans framførslur á føroyskum palli.

**Treytir**
Evnið er frítt, somuleiðis skipanin av evninum, men dentur verður lagdur á søgugongd, persónslýsingar og myndandi hugflog í leikinum. Longdin á leikinum eigur at vera á leið sum í vanligum sjónleikaframførslum. Leikritið skal ikki hava verið framført ella almannakunngjørt áður.

**Virðisløn**
Ein virðisløn á **100.000,- kr.** verður latin. Dómsnevndin hevur rætt til ikki at lata virðislønina, heldur hon tey innkomnu leikritini ikki vera virðislønarverd.

**Dómsnevnd**
Til at viðgera tey innsendu leikritini er dómsnevnd sett. Í nevndini eru Vár Jacobsen, dramaturgur, Olaf Johannessen, sjónleikari, og Helga Hjørvar, sjónleikari.

**Innlating**
Leikritini skulu latast inn dulnevnd við frámerki. Saman við leikritinum skal latast inn afturlatin brævbjálvi við sama frámerki uttan og við navnaseðli í, sum sigur, hvør ella hvørji, ið hava gjørt leikritið. Leikritini skulu vera latin inn í seinasta lagi 15. august 2000 og sendast Leikpalli Føroya.

**Leikpallur Føroya,**
Undir Pisuvarða 2,
postsmoga 212, 110 Tórshavn

## Trøð til sølu

Vit selja eina trøð í Havnardali. Trøðin er til støddar 12.930 m². Sambært byggisamtyktini liggur trøðin í 4. grundumráði, sum verður nýtt til landbúnað og alment frílendi og tilíkt. Servituttir eru eisini tinglýstir á ognina, millum annað at trøðin ikki kann útstykkjast uttan býráðsins samtykt.

Áhugaði kunnu venda sær til okkara fyri at fáa nærri upplýsingar.

**Advokatskrivstovan**
**Fr. Petersensgøta 9**

Halgir Winther Poulsen, adv. — Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. — Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. — Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**



## HON & HANN

31 65 15

Klædnahandilin
í
Miðbýnum

Vit søkja eftir dagligum lei›ara. Tú fært ábyrgd av handlinum, tú skalt tilrættisleggja dagliga arbei›i, markna›arføringina og síggja til, at handilin altí› er dagførdur vi› tí seinasta n ggja.

Tú kemur saman vi› ø›rum at standa fyri innkeypi og vitja klædnamessur.

Ta› er ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan klædnahandil.

Skrivlig umsókn skal stílast til:
Hon & Hann
Boks 1047
FO-110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi skjótast gjørligt. Starvi skal setast til 1. juli 2000.

## ALU-FELGUR



STÓRT ÚRVAL AV DEKKUM OG ALU-FELGUM

Sosialurin - 311820

**P/f Esmar Símonsen**
Kambsdalur
Tel. 44 44 05 • Fax 44 46 29
E-mail: es@es.fo

## Føroya best umtókti vøruvognur – nú aftur á goymslu
## Ford Express Van 1,8 diesel



Og prísurin er framvegis heilt í botni:
kr. 99.900,00 v/MVG

**P/f Wenzel**

Akranesgøta 5 - FO 100 Tórshavn - Tel. 313873 - Fax 311173 - www.wenzel.fo

Sosialurin - 311820

sosialurin
www.sosialurin.fo

## HON & HANN

31 65 15

Klædnahandilin
í
Miðbýnum

Vit hava klæ›ir til hennara og hansara.

Hárfrí›kan — Sólir — Piercing — Tatovering

Nú mangla vit ein vøddam kjara. Hevur tú áhuga so skriva til okkum um teg sjálvan og send møgulig vi›mæli.

Hon & Hann
Boks 1047
FO-110 Tórshavn

GÓÐKENDUR

## ROTTANGI
úr glasfipuri



FØROYSK FRAMLEIÐSLA

Prísur 6.500,-

team 85 • 31 65 11

**ALUMINIUM & PLASTVIRKIÐ P/F**
www.plastvirki.fo

**Umsiting:**
Tel 31 87 96
Fax 31 87 46
Í Svanga 23
Postboks 199
FO-110 Tórshavn
e-mail: plastvirki@plastvirki.fo

**Verkstaður:**
Norðagøta

## Betri svøvn

**BIOflex magnetviðgerð tí:**

- BIOflex magnetviðgerðin er avgjørt tann besta magnetviðgerðin í verðini!
- BIOflex hevur prógvað ávirkanina við dupultari blindtest!
- BIOflex hevur 100 ferðir størri ávirkan enn líknandi vørur!
- BIOflex er góðkent sum heilsuútgerð!
- BIOflex hevur víst, at yvir 92 % verða pínufrí og øll sova betri!

Vøran er testað á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn.

Sosialurin - 311820

Ring 21 79 16

Magnetviðgerð er tað nýggjasta innan pínuviðgerð - og júst BIO flex undirdýnan, sum er vard við einkarrætti í allari verðini, hevur víst, at 92 % verða pínufrí. Vello Føroyar veitir tær aftursendingarrætt í 5 vikur, tá dýnan hevur verið brúkt í minst 3 vikur.



**Viðgerð, ið virkar ímóti:**

- Øllum slagi av pínu
- Vøddastívleika
- Trupulleikum við svøvni
- Órógv í blóðrenslinum
- Einastandandi fyri ryggjatrupulleikar

BIOflex® MAGNETTERAPI

Vello Skandinavia Sp/f hevur síðani 1989 selt fleiri enn 25.000 BIOflex viðgerðir í Danmark og virkið hevur framhaldandi framgongd við viðgerðini. BIOflex er best á marknaðinum innan magnetiska viðgerð.

Nærri upplýsingar ella faldari fæst hjá: **Vello Føroyar**
Boks 354 - FO-700 Klaksvík • Tlf: 217916 - Fax: 457916



## Bilur í serklassa til sølu

Rætti bilurin til tann, sum vil hava tí fullkomnu koyrigleðina.

| | |
|---|---|
| Typa: | OPEL OMEGA 2.5 V6 |
| Orka: | Bensin |
| Effekt: | 180 HK |
| Árgang: | 5/96 |
| Koyrt: | 60 tkm |



Møgulig fígging kann útvegast ella gev eitt kontant boð.

Myndir av bilinum kunnu sendast áhugaðum ella hygg á heimasíðuna hjá Opel www.opel.com

Meira fæst at vita við at ringja til Jákup S. Joensen á tlf. 213536 ella 333536.